# Vita ikki hvussu barnið skal eita

**Næsta ár skal landsskatturin lækkast 60 milliónir. Men er talan um ein skattalætta ella er talan um eina umlegging**

SKATTALÆTTI ELLA UMLEGGING

*Àki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Hvørki Kaj Leo Johannesen, Jørgen Niclasen ella Kristian Magnussen kunnu blíva heilt samdir við seg sjálvar um, hvussu barnið skal eita*

Næsta ár skal landsskatturin lækkast 60 milliónir. Men er talan um ein skattalætta, ella eina umlegging

Tað er tann stóri spurningurin, sum politikarar nokk skulu fáa onkra festliga løtu burturúr teir komandu dagarnar.

Sum tað sæst á greinini omanfyri, er tað ein stórur spurningur, hvussu skattalættin komandi ár skal kallast. Er talan um ein skattalætta eftir samgonguskjalinum, ella er talan um eitt endurgjald til kommunur og skattgjaldarar fyri at yvirtaka barnaverndarøkið og fyri at barnsburðargrunnurin verður lagdur undir arbeiðsmarknaðin.

Vit hava spurt leiðandi politikarar úr samgonguni, men haðani fæst heldur onki greitt svar.

– Tað er ongin ivi um, at talan er um ein skattalætta. Men samstundis sum skattalættin verður latin, verða barnaverndarøkið løgd til kommunurnar og barnsburðargrunnurin lagdur til partarnar á arbeiðsmarknaðinum, sigur Kaj Leo Johannesen, formaður sambandsfloksins.

– Tað er tí eisini greitt, at tí verða nógvar kommunur noyddar at hækka kommunuskattin og tí er talan ikki um ein veruligan skattalætta.

– Men tað eru onkrar kommunur, sum eru so væl fyri, at tað kanska verður óneyðugt at hækka kommunuskattin og har verður talan um ein skattalætta.

– Verður niðurstøðan, at talan er um ein skattalætta eftir samgonguskjalinum, skal samhaldsfasti hækka. Men er skattalættin eitt endurgjald fyri barnaverndarøkið og barnsburðargrunnin, skal samhaldsfasti ikki hækka og hetta er tann stóri spurningurin, sigur Kaj Leo Johannesen.

Jørgen Niclasen, formaður í fólkaflokkinum í tingi, staðfestir, at talan er um skattalættan, sum varð avtalaður í samgonguskjalinum, men í hesum føri fáa kommunur og skattgjaldari øktar útreiðslur av barnaverndarøkinum og barnsburðargrunninum.

– Vit gjøgnumføra skattalættan, sum ætlað. Hjá teimum kommununum, sum eru so væl fyri, at tær sleppa undan at hækka skattin, er talan um ein veruligan lætta. Annars fer hesin skattalættin at geva kommununum rúmd fyri at hækka skattin, um tær vilja tað.

– Hjá teimum kommunum, sum hækka skattin, fer skattalættin at tódna.

Jørgen Niclasen staðfestir, at inngjaldið til samhaldsfasta fer ikki at hækka komandi ár.

– Nú gjørdust skattalættin ikki tað, vit ætlaðu og tí hækkar samhaldsfasti ikki.

Kristian Magnussen, formaður javnaðarfloksins á tingi, sigur, at næsta ár verður ongin skattalætti.

– Tað, sum hendir næsta ár, er ikki ein skattalætti. Tað er ein umlegging av skattinum, har landsskatturin lækkar, men har kommunur og skattgjaldarin fáa øktar byrðar av tí at barnsburðargrunnurin verður lagdur til partar á arbeiðsmarknaðin og barnavernrarøkið verður lagt undir kommunurnar.

– Sostatt koma skattgjaldarar og arbeiðsgevarar at betala økt avgjøld til barnsburðargrunnin og kommunur verða noyddar at hækka skattin fyri at fíggja barnaverndarøkið.

– Fyri at skattatrýstið ikki skal økjast, verður neyðugt at lækka landsskattin. Talan er tí ikki um ein lætta, men um eina umlegging.

– Tá ið talan er um ein skattalætta, eigur tað at merkja, at keypiorkan økist, men tað ger hon ikki.

Kristian Magnussen sigur, at kemur samgongan til ta niðurstøðu, at talan er um ein skattalætta eftir samgonguskjalinum, skal samhaldsfasti eisini hækka.

# Skattalættin skal definerast fyrsta dagin

**– Samgongan hevur ikki enn staðfest, hvussu verður við skattalættanum og samhaldsfasta næsta ár, sigur løgmaður**

SKATTALÆTTI ELLA UMLEGGING

*Àki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Samgongan fer fyrsta dagin at finna útav, hvat skal henda við samhaldsfasta eftirlønargrunninum næsta ár.

Tað sigur Løgmaður, Jóannes Eidesgaard.

Sum nevnt í øðrum greinum, hevur samgongan avtalað at lækka skattin, samstundis sum inngjaldið til samhaldsfasta skal hækka fyri eisini at kunna hækka útgjaldið.

Næsta ár lækkar landsskatturin 60 milliónir, men tað er óvist um samhaldsfasti verður broyttur kortini.

Eins og aðrir politikarar úr samgonguni, sigur, løgmaður, at tað er óvist, hvussu tað, sum verður gjørt næsta ár, skal definerast sum ein skattlætti ella sum ein umlegging.

– Skal talan vera um ein skattalætta, eigur tað at merkja, at skatturin lækkar. Men tað er óvist um tað ber til at tosa um tað í hesum føri, tí samstundis verða øktar byrðar lagdar á kommunur og skattgjaldaran.

Í hesum sambandi vísir hann á, at nú verður barnaverndarøkið lagt undir kommunurnar, samstundis sum barnsburðargrunnurin verður lagdur undir partarnar á arbeiðsmarknaðinum.

Tað fer at føra til øktar útreiðslur hjá kommununum og skattaborgarum.

– Tá ið vit hava tosað um skattalætta í hesum føri, hevur mest verðið tosað um at talan er um eitt endurgjald fyri at hesi øki eru løgd undir kommunurnar og partarnar á arbeiðsmarknaðin.

Løgmaður sigur, at sostatt má samgongan fyrst avgreiða um talan er um ein skattalætta eftir samgonguskjalinum, ella talan er um eina umlegging.

Og tað fer samgongan at koma til eina niðurstøðu um fyrsta dagin.

Men Løgmaður staðfestir, at ætlanirnar um at bøta um eftirlønina og samhaldsfasta, eru als ikki sleptar, hóast talan kanska verður um at útseta tað fyribils.

Tað veldst alt um, antin lækkingin í landsskattinum næsta ár verður defineraður sum ein skattalætti ella sum ein umlegging, sigur løgmaður.



*– Enn er ikki avgjørt um samhaldsfasti eftirlønargrunnurin hækkar næsta ár. Tað veldst um, hvussu lækkingin í landsskattinum verður defineraður og tað fer samgongan at finna útav fyrsta dagin, sigur løgmaður*